**Skúlastýrisfundur**

Dagfesting: 06.09.2017

Kl: 16:00–17:00

Til staðar: Sunrit Niklasdóttir, Nelly Debes Christiansen, Ragnar Isaksen, Vivi Davidsen, Súsanna Mortensen og Høgni Warberg

Marjun Danielsen hevði givið avboð til fundin.

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1. Góðkenna fundarfrásøgn
2. Fundurin við Vestmanna skúlastýrið í Vestmanna tann 27. sept kl. 17:15
3. Fundurin við MMR og lærararnar tann 4. okt. kl. 14:30-16:30
4. Felagsforeldrafundurin mikukvøldið 15. nov.
5. Fíggjarætlanin fyri 2018
6. Eftirmeting av garðdegnum
7. Ymiskt

Att 1: Fundarfrágreiðingin frá seinasta skúlastýrisfundi var góðkend og verður í næstum løgd út á heimasíðuna hjá skúlanum.

Att 2: Fundur verður við skúlastýrið í Vestmanna skúla í Vestmanna mikudagin 27. september kl. 17:15. Á fundinum fara vit m.a. at tosa um samstarvi millum skúlarnar. Høgni greiddi frá tí verandi samstarvinum millum skúlarnar, har 4-7 flokkur vitja hvønn annan tvær ferð pr skúlaár.

Att 3: Mikudagin 4. oktober verður skipað fyri skúlastýrisfundi saman við MMR og saman við lærarum skúlans. Kl. 14:30 til 15:30 koma umboð frá MMR at greiða okkum frá, hvørjir møguleikar eru við tímajáttanini til verkætlanir. Frá 15:30-16:30 verður samskifti millum skúlastýrið og lærarar skúlans á skránni, har vit m.a. fáa umrøtt hvørji ynski og væntanir lærararnir hava til skúlastýrið. Nelly og Sunrit baka kaku og Høgni bíleggur mat til henda dagin.

Att 4: Felagsforeldrafundurin, sum skúlastýrið skipar fyri, verður í skúlanum mikukvøldið 15. november. Skúlastýrislimirnir møta kl. 18:30 til at gera klárt. Kl. 19:00 leggur Sunrit fram ársfrágreiðingina. Kl. 19:30-21:00 kemur Kristian Eli at hava fyrilestur. Høgni fer at lýsa við hesum tiltakinum. Ragnar, Marjun og Vivi hava køku við til henda fundin.

Att 5: Høgni legði fram fíggjarætlanina fyri 2018, og fíggjarætlanin var ummæld á fundinum.

Att 6: Garðdagurin varð eftirmettur. Ov lítið av kaku var henda dagin. Eisini var tosað um, nær ein tílikur garðdagur eigur at byrja og enda.

Att 7: Høgni býtti út faldaran yvir skúlaárið 2017-2018 og gjørdi vart við, at faldarin er lagdur út á heimasíðuna. Høgni segði, at hetta skúlaárið eru 6 lærarar og 51 næmingar í Kvívíkar skúla. Turið Gaard Hansen hevur sagt seg úr starvið pr. 1. oktober fyri at royna heilt aðrar leiðir og avbjóðingar, og frá 1. oktober og restina av skúlaárinum er Maj-Britt Jacobsen sett í starv sum lærari í Kvívíkar skúla.
Sunrit nevndi, at hon í næstum fer at kalla arbeiðsbólkin saman, sum skal seta skjøtil á verkætlanina fyri fimleikarhøllina.